# Trivnaðarkanning, kravfesting

**Lýsing**

Sjúkrahúsverkið skal gera eina umfatandi trivnaðarkanning, fyri at meta um trivnaðin hjá starvsfólkunum á teimum trimum sjúkrahúsunum. Vit ynskja at fáa eina heildarmeting av trivnaðinum, bæði innan fyri sálarliga arbeiðsumhvørvið og arbeiðsumhvørvið sum heild. Trivnaðarkanningin skal vera við til at geva eina mynd á øllum stigum (niveau'um) av trivnaðinum hjá starvsfólkunum í Sjúkrahúsverkinum. Harafturat skal trivnaðarkanningin nýtast sum eitt strategiskt amboð til at varðveita og styrkja Sjúkrahúsverkið sum eitt dragandi og virkið arbeiðspláss, har trivnaður er í hásæti. Endamálið er eisini at síggja, hvussu væl virðini hjá Sjúkrahúsverkinum eru verksett.

**Stødd**

Áleið 1.300 starvsfólk, deild yvir trý sjúkrahús.

**Kravfesting**

| | |
|---|---|
| Dagfesting | Trivnaðarkanningin skal setast í verk/sendast út til starvsfólk í september 2022.<br><br>Ynskiligt er, at hava úrslitini frá kanningini greinaði og okkum í hendi í oktober 2022. |
| Projektleiðsla | Vit vilja at veitarin fylgir okkum í allari tilgongdini – frá byrjan til enda. Hetta merkir í fyrireikingararbeiðinum, ímeðan trivnaðarkanningin er í gongd og eftir at trivnaðarkanningin er send út og úrslitini fingin til vega. |
| Trivnaðarkanningin | Vit síggja fyri okkum eina trivnaðarkanning, har øll ella mest sum øll starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum svara á talgildum miðli. Starvsfólkini skulu vera dulnevnd í kanningini. Vit vænta eitt spurnarblað við áleið 30-40 spurningum. |
| Ábyrgd | Veitarin skal kunna hava ábyrgd av at alt arbeiðið er gjørt rætt og hava ábyrgd av at koyra sjálva trivnaðarkanningina. Eisini skal veitarin viðgera tilfarið eftir at starvsfólkini hava svarað kanningini og lýsa hvørji øki mælt verður til at arbeiða víðari við og hvørji øki eru nøktandi. |
| Úrslit | Neyðugt er at síggja úrslitini á ymiskum stigum (niveau'um):<br>• samlað úrslit fyri øll sjúkrahúsini<br>• samlað úrslit fyri hvørt sjúkrahús<br>• úrslit fyri hvønn depil (Landssjúkrahúsið)<br>• úrslit fyri hvørja deild. |
| Mál | Neyðugt er at trivnaðarkanningin er á minst tveimum málum – føroyskum og enskum. |
| Talgildur pallur | Vit vilja hava ein felags pall, har leiðarar í Sjúkrahúsverkinum kunnu arbeiða við úrslitunum. Ein pallur sum er talgildur og ger tað visuelt gott og nemt hjá leiðarum at arbeiða við kritisku økjunum og síggja jaligu økini á síni deild. Øll úrslitini skulu vera á hesum talgilda palli, so ovasta leiðsla kann síggja heildina fyri Sjúkrahúsverkið, samstundis sum til ber at síggja úrslitini fyri einstøku deildirnar/deplarnar. |

| | |
|---|---|
| | |
| Verkstova | Vit vilja hava úrslitini løgd fram fyri leiðarum og eisini at víst verður hvussu arbeiðast skal við úrslitinum, t.d. á einari verkstovu. |

**Tilgongdin frameftir**

Sjúkrahúsverkið bjóðar við hesum uppgávuna at gera eina trivnaðarkanning í útboð við freist, sí niðanfyri. Tá ein veitari er funnin verður trivnaðarkanningin endaliga ment í samstarvi millum Sjúkrahúsverkið og veitaran.

Tíðarætlan:

- Vika 20: útboðið tøkt á útboðspallinum – 18. mai 2022.
- Vika 21 og 22: veitarar spyrja um ivamál. Freist at spyrja er 1. juni 2022 kl. 12:00 og skulu sendast til elijc@ls.fo.
- Vika 23: tann 8. juni 2022 kl. 12:00 er freist at lata tilboð inn.
- Vika 24 og 25: viðgerð av tilboðunum.
- Vika 25: Sjúkrahúsverkið tekur avgerð og fráboðan verður send veitarunum tann 22. juni 2022.

**Meta um tilboðini**

Tað er umráðandi at tryggja góðskuna, tá ið mett verður um innkomnu tilboðini. Vektingin av innkomnu tilboðunum verður gjørd soleiðis:

50% kostnaður
50% góðska. Við góðsku meina vit: Royndir og tilvísingar